

# OMV nýggjur leikari á Føroyaøkinum



*Wayne Kirk, kanningarleiðari hjá OMV sigur seg vóna, at felagið kann vera við til at finna olju og gass við Føroyar*

*Mynd Jan Müller*

**2. ÚTBJÓÐING**
*Jan Müller*

Størsta fyritøkan í Eysturríki, oljufelagið OMV er nú vorðin partur av leitingini eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum. Tá leitiloyvini vórðu tillutað seinnapartin mánadagin av Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í oljumálum, var hetta stutta og sjáldsama navnið nevnt millum tey fyrstu. OMV, sum er sera virkið í bretskum øki, fekk blóð uppá tonnina, tá tað saman við øðrum feløgum gjørdi eitt stórt oljufund í Rosebankøkinum beint uppat føroyska markinum. Feløgini í hesum loyvunum settu seg saman og gjørdu av at royna eydnuna í føroysku 2. Útbjóðingini eisini. Tey søktu um eitt øki, sum liggur beint í nánd av Rosebankfundinum – og fingu tað. Kanningarstjórin hjá OMV, sum hevur verið við í arbeiðinum á føroyaøkinum fyrr í Amerada Hess, Wayne Kirk er sera glaður um tillutanina. –Vit eru sera fegnir um at vera við í leiting við Føroyar fyri fyrstu ferð. Hetta er eisini í tráð við okkara arbeiði í bretskum øki, har vit bæði eru við í framleiðandi oljufeltum og við í loyvum, har leitað verður eftir olju og gassi. Vit síggja stórar møguleikar á landgrunninum.

# øroyaøkið

hesaferð sum eitt heilt nýtt felag undir heitinum ChevronTexaco. Dave Lewis sigur, at talan er um eitt heilt annað felag.

Tað er ein sannroynd, at loyvi á landgrunninum hóvar ChevronTexaco sera væl. Tað passar sum fótur í hosu inn í tess arbeiðskonsept, nú tað hevur gjørt eitt fund beint hinumegin markið. Eitt fund, sum letur upp fyri heilt nýggjum møguleikum á Atlantsmótinum. Tað vísir seg at løgini báðumegin markið eru tey somu, og tí er rættiliga sannlíkt, at møguleikarnir eru góðir fyri at gera líknandi fund føroysku megin markið.

Ætlanin er at bora fleiri avmarkingarbrunnar í summar. Leitað verður eftir boripalli í løtuni. Ætlanin er so eisini at skjóta nýggjan seismikk í loyvunum báðumegin markið sigur Dave Lewis. Við nýggjum seismikki yvir bæði loyvini fer at vera lættari at fáa eina heildarmynd av jarðfrøðini í undirgrundini í nettupp hesum økinum.

Uppá fyrispurning um møguleiki er fyri, at oljukeldan í bretska økinum heldur fram yvir í føroyskt øki sigur Dave Lewis, at tað ber ikki til at siga enn, men teir halda seg síggja, at jarðfrøðin er tann sama. –Vónandi kunnu vit við avmarkingarbrunnum í Rosebank í summar siga meira um møguleikan fyri at ein virkin oljuskipan heldur fram yvir í føroyska økið. Kunnu vit finna prógv fyri tí kann hetta koma at skunda undir kanningarnar á føroyska økinum, soleiðis at vit kunnu fara undir eitt rættiliga miðvíst arbeiðsprogram í hesum árinum yvir loyvini báðumegin markið.

Uppá fyrispurning nær ein brunnur verður boraður í føroyskum øki sigur Dave Lewis, at tað veldst um, hvussu gongur við avmarkingarbrunnunum í Rosebankøkinum. Hann útilokar ikki, at brunnur kann verða boraður í 2007 ella 8, men tá skal tað so ganga væl allan vegin.

Dave Lewis sigur, at teir fara liva upp til føroysku ynskini at brúka føroysk tænastur í sambandi við komandi kanningar, har tørvur verður á tí.